# Evald fyrstur um Nólsoyarfjørð

**Svimjingin um Nólsoyar leygardagin eydnaðist væl. Evald Rasmussen var fyrstur á mál. Hann brúkti 1 tíma, 20 minuttir og 54 sekund at svimja úr Havn til Nólsoyar**

SVIMJING

Svimjararnir, sum svumu um Nólsoyarfjørð leygardagin, høvdu blíðan byr.

Allir fimm luttakararnir fullførdu, og tann seinasti náddi í land fyri løtu síðani. Tey flestu raktu inn á víkina í Nólsoyar bygd, men onkur fór tó eitt sindur norður um.

Erlendur Ramussen,




*Fimm teir bestu svimjararnir um Nólsoyarfjørð vóru: Nr. 1 Evald Rasmussen 1.20.54, Nr. 2 Gunnar Dahl Olsen 1.24.35, Nr. 3 Erlendur Simonsen 1.34.29, Nr. 4 Helena G. Jacobsen 1.42.00, Nr. 5 Trygvi Berg 2.40.39*

sum bæði er ein av fyriskiparunum og luttakarunum, sigur, at alt gekk væl. Streymurin var spakur, og veðrið var gott.

Úrslitið av svimjingini var hetta:

Nr. 1 Evald Rasmussen 1.20.54
Nr. 2 Gunnar Dahl Olsen 1.24.35
Nr. 3 Erlendur Simonsen 1.34.29
Nr. 4 Helena G. Jacobsen 1.42.00
Nr. 5 Trygvi Berg 2.40.39

Leggjast kann afturat, at Helena G. Jacobsen, umframt at vera einasta kvinna, eisini var yngsti luttakari. Hon er trettan ára gomul.

Erlendur Simonsen sigur, at tey hava skipað fyri svimjingini síðan 1998, og síðan hava tey svomið hvørt ár yvir um Nólsoyarfjørð.

Metið á hesum teinum er 1 tími og 17 minuttir, og tað setti Jóannes á Fløtti í 2004.






# Bilførarar rýma undan yvirkoyrdum seyði

**Tað kemur meira enn so fyri, at bilførarar rýma frá yvirkoyrdum seyði uttan boða bóndanum frá, sum eigur seyðin. Higartil í ár hevur Tórfinnur Dalsgarð, bóndi á Velbastað, mist nógvan seyð á vegunum, og tá hetta ikki verður fráboðað, er tann fíggjarligi missurin hjá bóndanum stórur**

FERÐSLA

Theodor E. D. Olsen
theodor@sosialurin.fo

Tað er ikki altíð, at fólk melda eitt bilóhapp, eftir at tey hava koyrt á ein seyð.

Tað má Tórfinnur Dalsgarð, bóndi á Velbastað, sanna.

Higartil í ár hevur hann mist 8 ær og eini 4-5 lomb í ferðsluni, og tað er sjáldan, at hann hoyrir nakað frá bilførarunum. So seint sum í seinastu viku noyddist at lamb hjá Tórfinni Dalsgarð at lúta fyri einum bili.

- Fólk siga næstan ikki frá, sigur Tórfinnur Dalsgarð.

Sum so metir bóndin ikki, at talan er um djórapínslu, tí sum oftast doyr seyðurin beinanvegin. Hann hevur eisini sæð, at onkur hevur svævað ein seyð, sum er komin fyri ein bil.

Hinvegin kann talan vera um óhepnar fíggjarligar avleiðingar fyri bøndur,



*Bøndur noyðast sjálvir at bera kostnaðin av deyðum seyði, um tað ikki verður uppklára, hvør hevur koyrt á teir*

sum missa nógvan seyð á henda hátt. Tórfinnur Dalsgarð sigur, at ein ung ær kann hava eitt virði upp á eini 2500 krónur, og tær flestu ærnar, hann hevur mist, hava verið ungar.

### Missa ikki bonus

Tað er serliga í Havnardali og við Velbastaðháls, at bilar hava rent á seyð hjá Tórfinni, og tað kann vera sannlíkt, at talan um er um bilførarar, sum ætla sær at náa ferjuna á Gomlurætt. Bóndin staðfestir, at trupulleikin bara er vaksin, síðani vegurin varð gjørdur, og at hann hevur heitt á Landsverk um at seta stik upp og at gera smáar smogur undir vegnum til seyðin, men hesi ynski eru ikki eftirlíkað.

Tórfinnur Dalsgarð, at ein orsøk til, at bilførarar ikki boða frá er, at teir møguliga eru bangnir fyri at missa bonusstig í teirra trygging, men tað heldur hann ikki vera nøkur orsøk til.

Hinvegin noyðast bøndur sjálvir at bera kostnaðin av deyðum seyði, um tað ikki verður uppklárað, hvør hevur koyrt á teir.

Frá Tryggingarfekagnum Føroyum verður sagt, at bilførarar skulu vera ábyrgdartryggjaðir, og tí missa teir ikki bonus, um teir boða frá, at teir hava koyrt ein seyð. Hinvegin er skrokktryggingin sjálvboðin, og tí er tað altíð eitt val, bilførarin skal gera, um tað loysir seg best at umvæla ein møguligan skaða og harvið missa bonus frá tryggingini, ella einki at gera við málið.